VEÐRIÐ

Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið



Veðrið í dag:
Fleyr til gul av ymsum ættum og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 3 og 6 stig.



Veðrið leygardagin:
Hann veksur vindin upp í hvassan vind av suðri og fyrrapartin sólglottar, men seint um kvøldið regn. Hitin millum 5 og 8 stig.



Veðrið sunnudagin:
Lot til andøvsgul av suðri og regn av og á. Hitin millum 3 og 6 stig.

Veðrið mánadagin og týsdagin:
Lot til andøvsgul av suðri ella av ymsum ættum og regn av og á. Hitin millum 4 og 8 stig.

Rátt og sterkt í Lítluvík

27 ára gamla Hannah Skarsholm sýnir frá 17. apríl til 23. apríl fram í Smiðjuni í Lítluvík

LIST
Ingrid Bjarnastein

– Myndirnar hjá mær støði í litunum, og í evnisliga, sum tilfarið gevur. Eg arbeiðið við litum, eg vísi pigment, sum hava mattan og kornutan karakter, sigur Hannah Skarsholm, sum býr og arbeiðir í Keypmannahavn.

Tá hon arbeiðir við myndunum nýtir hon ongantíð ein pensil til at seta farvur á løriftið, men harafturímóti nýtir hon hørð amboð, sum spartlar og grafikkrullur. Soleiðis kemur ein rúgva av løgum av máling á, og soleiðis hópast tilfar og orka upp, og síðani vaskar hon nøkur stað í myndini, soleiðis, at lagið innanundir traðkar fram, og soleiðis skapar alt hetta eina dýbd.

Íblásturin kemur úr náttúruni, millum annað úr Føroyum, har Hannah hevur búð. Skiftandi luftin, ljósið, myrkrið, friðurin. Tað er økið millum abstraktión og myndan, sum upptekur Honnu.

Framsýningin letur upp 17. apríl klokkan 12.00 og heldur fram til 23. apríl. Opið er hvønn dag frá klokkan 12–18, leygardag 10–16 og sunnudag frá 14–17.

Hitalagið kring knøttin

Illulisat	÷13
Nuuk	÷7
Qaqortoq	÷3
Ammassalik	÷5
Saint John's	5
Halifax	8
Reykjavík	2
Seyðisfjørður	6
Tórshavn	7
Lerwick	8
Aberdeen	10
London	11
Tromsø	5
Bergen	7
Oslo	–
Stokkhólm	11
Keypmannah.	11
Helsinki	10
Moskva	10
Berlin	8
Warzawa	9
Kiev	15
Bukarest	7
Paris	11
Madrid	14
Róm	16
Malorca	17
Athen	19
Malta	22
Tunis	22
Beijing	21
New Dehli	–
Bangkok	35
Jakarta	32
Sydney	26
New York	15
Miami	26
Los Angeles	16
Meksikobýur	–
Panama	29
La Paz	14
Rio de Janeiro	–
Buenos Aires	18

LUFTTRÝSTIÐ

Eitt lágtrýst, 1011 hPa. yvir Íslandi grynnist og eitt hátrýst, 1035 hPa. yvir Atlantshavinum á 48N-37V fer í landnyrðing eystan.

Eitt lágtrýst, 986 hPa. eystan fyri Hvarvið fer í landnyrðing og brúgvalagið haðani verður væntandi við Føroyar leygarkvøldið.

Spf.
...hvør sigur at vit eru sum onnur?
HESTPRENT
Dvørgastígur 7
100 Tórshavn
tel 31 45 55
fax 31 80 26
hestoy@hestprent.fo

HITALAGIÐ



Hitalagið mált frá 10/04 kl. 06⁰⁰– 11/04 kl. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 6,2°
Minsti hiti máldur í apríl: ÷9,9° Mesti hiti máldur í apríl: 15,0°

AVFALLIÐ



Avfallið: 0,9 mm – mált frá 10/04 kl. 06⁰⁰– 11/04 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í apríl: 22,6 mm

GEVIÐ BLÓÐ
BLÓÐBANKIN
Telefon 311397

VESTFALLSKYRRINDI

10. apríl: Mánin longst frá jørðini
12. apríl: Tendring

Kelda, Almanakkin 2002

Dagur	Suðuroyar—/ Vágafirði fp.	sp.	Skúvoyar—/ Skopunarfirði fp.	sp.	Hestfirði/ Sundalagnum fp.	sp.	Vestmanna—sundi fp.	sp.	Mykines—firði fp.	sp.	Nólsoyar—firði fp.	sp.	2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp.	sp.	Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp.	sp.	Kalsoyar—/ Svínoyarfirði fp.	sp.	Hvanna—sundi fp.	sp.	Fugloyar—firði fp.	sp.
12. apr	07.23	19.43	06.23	18.43	06.38	18.58	09.23	21.43	10.23	22.43	05.38	17.58	04.38	16.58	07.38	19.58	08.38	20.58	07.08	19.28	08.23	20.43
13. apr	08.00	20.18	07.00	19.18	07.15	19.33	10.00	22.18	11.00	23.18	06.15	18.33	05.15	17.33	08.15	20.33	09.15	21.33	07.45	20.03	09.00	21.18
14. apr	08.37	20.57	07.37	19.57	07.52	20.12	10.37	22.57	11.37	23.57	06.52	19.12	05.52	18.12	08.52	21.12	09.52	22.12	08.22	20.42	09.37	21.57
15. apr	09.17	21.38	08.17	20.38	08.32	20.53	11.17	23.38	—	12.17	07.32	19.53	06.32	18.53	09.32	21.53	10.32	22.53	09.02	21.23	10.17	22.38

5 707265 100050 >